Guds náði, hon er sum eitt veraldarhav: C-dur

     C            C7                F         C
1/4. Guds náði, hon er sum eitt veraldarhav,
   F             C         G
so botnleys og endaleys víð;
    C                        F          C
lat ganga tí teymin, høgg landtogið av,
         D                    G7
og legg út, har ið náðin er frí!

Niðurlag:
 G7   C        G  C
 Legg út, legg út á hav,
                         G
høgg av, hvat forðar tær,
     C             C7        F   C
legg út, legg út, út á Guds náði hav!
C7/F     G7     C
Einki tær fattast har.

2/4. Men mangur enn liggur við teymin í dag;
hann havið av náði víst sá,
men torir ei loysa og halda avstað,
og kann tí ikki hvíluna ná.

3/4. Ein annar, hann loysir, men drálar tó, har
sum stilli og deyðavatn er;
hann ræðist, tá havið hitt víða hann sær,
og hann ivast, um náðin hann ber.

4/4. Nei, sælur tann maður, sum ivast ei her,
men sleppir fortoyning í dag!
Hann sælur skal síggja, at náðin, hon ber,
og hans troyttaða sál verður glað.

**A.B. Simpson (Amer.), 1843-1919.*
*(V. Danielsen týddi).*